## DAGSINS MEINING

# Norðurlendskt samstarv

Ì hesum døgum er ársfundur hjá Norðurlandaráðnum, og umboð fyri løgting og landsstýri eru sum vanligt við á fundinum. Norðurlendska samstarvið hevur nú gott og væl halvthundrað ár á baki, og ymiskt er, sum mett verður um týdningin av samstarvinum. Samstarvið er eitt politiskt samstarv sum gongur fyri seg millum tingmenn og millum ráðharrar. Norðurlond eru í serstøðu, av tí at tey flestu teirra eru so lík í mentan, søgu og demokratiskum hugburði. Samstarvið er vanliga sera gott og uttan teir stóru trupulleikarnar og mangan fyrimyndarligt fyri altjóðasamfelagið.

Sum er, eru tríggir av suverenu norðurlendsku statunum limir í ES og fýra lond eru limir í NATO. Hetta tykist tó ikki nerva samstarvið. Heldur er tað tvørturímóti soleiðis, at hetta beinleiðis fremur samstarvið á tann hátt, at londini, sum eru limir í ES ella NATO kunnu tala søkina hjá teimum, sum ikki eru limir. Føroyar, Grønland og Áland hava ikki sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Tá vit taka lut í norðurlendskum samstarvi, er tað óbeinleiðis umvegis danska limaskapin. Tó eru sendinevndirnar úr hesum sjálvstýrandi tjóðunum ikki partar av ávikavist donsku og finsku sendinevndunum, og er hetta ein viðurkenning av, at sendinevndirnar umboða serstakar tjóðir. Føroyar hava eisini umboð í nevndum og ráðum hjá ráði og ráðharrastovni. Vit eru við í Norðurlendska Mentanargrunninum, í nevndum viðvíkjandi bókmentum, tónlist, leiklist, børnum og ungum, umhvørvi og mongum øðrum. Tveir norðurlendskir stovnar eru í Føroyum nevniliga NORA og Norðurlanda húsið og virka báðir sera væl.

Spurningurin um fullan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum er sum nevnt reistur, og taka allir flokkar undir við hugskotinum. Hetta er sera áhugavert, og einki er at ivast í, at Føroyar høvdu fingið nógv burtur úr fullum limaskapi. Hetta mál eigur tí ikki at verða slept, men eiga landsstýri og løgting at fylgja væl við viðgerðini av hesum máli. Roknast má við, at hetta mál fer at taka drúgva tíð, og fer politiska gongdin í Føroyum ivaleyst at hava sína ávirkan á hetta mál. Tað er umráðandi, at Føroyar eru við í slíkum altjóða samstarvi sum tað norðurlendska. Her fáa vit royndir og kontaktir, og okkara umboð kunnu verða við til at breiða út kunnleika um Føroyar og um føroysk viðurskifti. Tað er umráðandi, at okkara umboð taka uppgávuna í størsta álvara, soleiðis, at tey fáa nakað burturúr og soleiðis at arbeiði teirra í Norðurlandaráðnum er teimum og okkum øllum til gangs og til sóma. At Danmark nú hevur tikið fyrivarni fyri sjálvstøðugum føroyskum limaskapi er nakað, sum vit mugu taka upp í størsta álvara í tí heimliga orðaskiftinum eisini. Nú føroyingar standa saman um henda limaskap eiga vit so eisini at gera alt vit eru ment fyri at sannføra hini Norðurlondini og eisini Danmark um, at alt tað føroyska fólkið stendur aftanfyri samtyktina um at fáa limaskap. Fullur limaskapur í Norðurlandaráðnum er ikki nakað nýtt. Umbøn varð eisini send um hetta í sjeytiárunum og tá tók Danmark einki fyrivarni. Áhugavert kundi verið at vitað, hvat er broytt síðani tá, tí grundlógin er tann sama.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Jóannes Eidesgaard kann enda í geglinum

**Sjúrður Skaale**



Jóannes Eidesgaard kann uttan iva setast í fongsul fyri sín skendska atburð. Tað kann gerast sera dýrt fyri Javnaðarflokkin

Heldur enn vegna Javnaðarflokkin at biðja um umbering fyri at Katrin Dahl Jacobsen av tingsins røðarapalli hevur samanborið Høgna Hoydal við Hitler, ger Jóannes Eidesgaard í bløðunum í gjár tað øvuta: Hann gevur Katrini Dahl Jacobsen rætt! Sambært Eidesgaard KANN Høgni Hoydal veruliga samanberast við eitt av størstu bølmennum í mannasøguni.

Formaður Javnaðarfloksins skrivar soleiðis:

"Tjóðveldisflokkurin skírdi meg fyri hálvan føroying, og Lisbeth L. Petersen fyri hálvan dana, meðan Høgni Hoydal var einasti rætti føroyingurin. Hvat minnir slíkt okkum um? Hvør brúkti júst somu terminologi um ta reinu rasuna?"

Jóannes Eidesgaard sipar til eina lýsing, sum stóð í Sosialinum dagin fyri síðsta løgtingsval.

Men hvørki Tjóðveldisflokkurin ella Høgni Hoydal høvdu gjørt ella góðkent hesa lýsing.

Sama kvøld sum lýsingin stóð í blaðnum, ringdi Høgni Hoydal persónliga til bæði Lisbeth og Jóannes. Hann greiddi teimum frá at hetta ikki var hansara verk, men bað kortini um umbering fyri, at tey vórðu sett fram sum vánaligir føroyingar. Tað veit eg, tí eg sat í sama rúmi.

Dagin eftir, valdagin, tók lýsingarfyritøkan Team 85 fulla og heila ábyrgd av lýsingini, og gjørdi greitt, at Tjóðveldisflokkurin hvørki hevði bílagt hana ella góðkent hana. Málið fekk seinni avleiðingar innanhýsis á lýsingarfyritøkuni, eins og sakarmál bleiv millum Tjóðveldisflokkin og Team 85.

Alt hetta veit Jóannes Eidesgaard.

Kortini brúkar hann hesa lýsing í enn eini roynd at samanbera Høgna Hoydal við sjálvan Hitler.

At Javnaðarflokkurin ger slíkt, er vorðið gerandiskostur. Bara hesa farnu tíðina eru fýra dømi:

Líkið av Annu Lindh var ikki meir enn kólnað, fyrr enn blaðstjórin á Sosialinum royndi at seta drápið í samband við føroyska fullveldisvongin.

Undir fíggjarlógarviðgerðini pástóð pástóð Kristian Magnussen av tingsins røðarapalli, at Tjóðveldisflokkurin hevði "forlovað seg" við terrorfelagsskapinum ETA.

Undir somu viðgerð royndi Katrin Dahl Jacobsen at seta Høgna Hoydal í samband við nazistarnar.

Og so kemur sjálvur formaðurin fram. Í stíli við sínar partamenn nýtir hann í gjár skendskar lygnir í royndini at seta Høgna Hoydal í bás við tað stýrið, sum drap 6 milliónir jødar, hevði við sær at Europa varð sundursorað, og at 60 milliónir menniskju mistu lívið.

Eg skilji væl, at javnaðarmenn eru frustreraðir, nú teir sita í andstøðu á áttanda ári. Men um Jóannes Eidesgaard heldur, at slíkar lygnir, slík álop og slík sjúklig útspilling fara at gera hann til løgmann, má hann trúgva um aftur.

Eitt sindur av heiðurligheit er framvegis til. Bæði millum fólk og millum politikarar. Og einki heiðurligt menniskja kann góðtaka tann atburð, sum leiðsla Javnaðarfloksins sýnir í løtuni.

Tí eru í løtuni tíverri ikki útlit til, at nøkur breið tjóðskaparlig semja verður funnin í bræði. Hóast nógv, bæði í Fólka- og Tjóðveldisflokkinum, fegin vildu gjørt eina slíka semju saman við Javnaðarflokkinum. Við síni óndu herferð setir Javnaðarflokkurin seg sjálvan uttanfyri alt samstarv.

Nakað heilt annað er, at Jóannes Eidesgaard helst endar í geglinum, um Høgni Hoydal stevnir fyri ærumeiðing. Og so leingi hann situr har, verður hann ið hvussu er ikki løgmaður...

# Yvirtøkulógin eitt vegamót ella ein fella?

**tórbjørn jacobsen**



**Lansstýrið og danska stjórnin royna í løtuni at koma undir land við eini yvirtøkulóg, sum skal gera tað smiðligari, lættari og greiðari at fremja setningin í løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroya fólks. Bara sjálv skipanin av føroyska statinum verður hildin uttanfyri, tað er ein spurningur sum verður avgjørdur á fólkaatkvøðu í 2012. Samgongan eigur at tryggja sær, at lógin eittans er jarnbrot framímóti fullari sjálvstøðu, og at hon á ongan hátt skalar frumrættin til tjóðina. Dyggasta fólkarættar-ekspertisa í heimi eigur at vera konsulterað, soleiðis at leikur, ið ikki kann endurleikast og møgulig mistøk ikki koma fyri. Annars er tíðin komin, harið meira ferð eigur at verða sett á sjálvstýrismotorin, skal aðalsetningurin í samgonguskjalinum røkkast. Verða mál sum løgregla og rættarskipan ikki skipaði sum føroysk mál sum skjótast, rotast samgongan upp innanífrá, og valdið liggur aftur í hondunum á teimum, ið hava politiskt status quo sum aðalmál. Tjóðin andøvir tá aftur uppí landssynningin. Í naggatødn. Við ongum stavnhaldi.**

Lívið hevur eina meining, eina hendinga meining; tað gongur sína gongd, framá, uttan at nøkrum tørvar at skumpa undir, eingin leikur kann endurtakast, og oftani heldur ikki rættast fyri møgulig mistøk. Tí er neyðugt at hugsa gjølla um

*Framhald á næstu síðu*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ætlaða yvirtøkan av fíggjarøkinum – Fortel okkum, hvussu hetta skal fyriskipast harra landsstýrismaður

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*



Um hetta ætlaða yvirtøkumál hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður sagt "sitat":

"Hetta er størsta stigið fram móti einum samfelagsbúskapi, har vit sjálvi hava avgerðarrættin og ábyrgdina. Vit eru farin undir arbeiðið at yvirtaka alt fíggjarøkið, tað vil siga penga- og kredittmál", sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.

Yvirtøkan fevnir um lóggávuvaldið mótvegis peninga- og kredittstovnum. Eisini fíggjareftirlit og innskjótaratrygd eru uppi í yvirtøkuni -

Hetta sum oman fyri siterað - eitt av ætlaðu yvirtøku málunum, sum stórt sæð onga viðgerð hevur fingið av okkara fjølmiðlum, tað er higartil "skoyta " elegant tvørtiryvir tí, sum um tað ongan týdning hevur alment.

Fíggjarøkið er Vitalt og umráðandi fyri okkum øll.

Økið er sera umráðandi og vitalt fyri okkum øll sum livað í hesum landið , - tí tað hevur við ALT okkara fíggjarkervi at gera og heldur m.a. eisini eftirlit við at okkara fíggjarstovnar gera sítt arbeiði til lítar og halda seg innan lógargivnu karmarnar.

Okkara peningastovnar/ fíggjarstovnar eru ídag partur av donsku skipanini og undir eftirlitið av danska fíggjareftirlitinum, sum heldur skil á og eftirlit við øllum fíggjarstovnum í danska ríkunum.

Lógarverkið hesum viðvíkjandi og uppdateringar, sum støðugt verða framdar í einum alsamt broytandi heimið verður umsitnir av hesum mynduleika.

Fíggjareftirlitið á føroyskum hondum:

Eg loyvið mær at seta spurnartekin við hvussu professionelt hesin kemur at verða umsitin av fólkið sum einans skulu eftirkannað 1 banka og 3 sparikassar, - í mun til eitt "servant" team ,sum hevur allar bankarnir í ríkunum at halda eftirlit við??

Verður yvirhøvur hugsað um hesi tingini? Eg ivist stórliga.

"Pengeinstitutternes Garantifond." - Samhaldsfesti millum peningastovnarnar.

Okkara bankar og sparikassar eru eisini partur av eini samhaldsfastari i.e. "solidariskari" skipan við donsku bankarnar og sparikassarnir.

Kemur ein banki ella sparikassi í fíggjarligar trupulleikar ,sum enda við konkursið — tá hefta bankarnir og sparikassarnir solidariskt fyri hvørjum ørðum við eini upphædd, sum í stødd er tengd saman við støddina á einstaka banka/ sparikassanum.

Um vit t.d. takað Føroya Banka og Den Danske Bank sum dømi, so er býtislykilin tann, at um t.d. Den Danske Bank fór av knóranum so hefti Føroya Banki fyri ca. 10. mio sum teirra parti í garantifonden .

Hinvegin, - um Føroya Banki for á heysin, so er upphæddin, ið Den Danske Bank heftir fyri í garantifondinum ca. 700 mió.

Um fíggjarstovnar í kongaríkinum fara á heysin ídag, so tryggjar "Pengeinstitutternes Garantifond", sum verður umsitin av Danska Tjóðbankanum at: :

- Allir uppspararar fáa afturgoldið upp til Kr. 300.000 frá trygdargrunninum.
- Allir pensiónsuppararir fáa 100% av teirra pensiónsuppsparing endurgoldna frá trygdargrunninum.

Tá (um) tit yvirtaka fíggjarøkið sum føroyskt sermál og harvið fara burturúr danska kervinum, - tað er jú tað sum landsstýrismaðurin ætlar, - hvussu verður støða okkara tá ??

Hvør tryggjar tá pensións - og vanliga uppspararan í føroysku peningastovnunum ??

Sagt í tíðindaskrivinum er eisini at landsstýrismaðurin fegin svarar faktuellum" spurningum og mínir eru hesir:

*1) Hvør verður trygdin frameftir og hvør veitir hana?*

*2) Hvat verður væntaði kostnaðurin av hesi yvir tøku?*

*3) Eru peningastovnar og bankar í Føroyum spurdir til ráðs, ella teirra hugsanir hoyrdar í hesum sera umráðandi máli?*

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, verður vinarligast biðin at svara hesum spurningum alment, tí teir eru sera relevantir fyri allar føroyingar at fáa svaraðar.**

**Uttanumtos verður frábiðið! – Einans fakta er áhugavert at fáa greitt svar uppá.**

*Framhald av síðu 10*

hvatið man vil og at vera varugur um hvatið man tekur sær fyri. Hesi orðini eigur spaniólin, heimspekingurin Fernando Savater, sum m.a. hevur skriva bøkurnar "Hin politiski breyðsnerkjarin" og "Hugsanir frá einum kannibali".

Várið 1998 gjørdist politiska várið í Føroyum. Politiska skipanin, sum í hálvthundrað ár hevði ligið og andøvt uppí landsynningin, varð vambakastað av fólkinum. Sjálvstýrisflokkarnir fingu meirilutan, undanvind, og settu fyri fyrstu ferð síðani fólkaatkvøðuna, kósina beint ímóti føroyska statinum. Alt hevur ikki bara verið ein dansur á rósum síðani, nógv mistøk og mangar undanstøkkingar, men kortini liggur skútan framvegis á kósini.

Eingin ivast í frumburðarrættinum til landið og føroysku tjóðina. Harvið er illa hugsandi, at nakar í álvara hugsar um at endurtaka mistakið hjá Esavi, tá ið hann spældi sær av við alt - fyri breyð og ein verð av flatbønum. Heldur ikki javnaður og samband, sum skilst. Hesir, sum í 48 lótu danir smoyggja eina heimastýrislóg niður yvir føroyska fólkið, siga seg virða og æra sjálvsavgerðarrættin og føroyska frumrættin til tjóðina, hóast teir liggja tvørir í alduni og ongan proaktivan leiklut ætla sær á leiðini fram ímóti skipanini av føroyska statinum.

Samgongan er eisini alt ov lítið á leið komin í sínum sjálvstýrisstarvið. Ein góður triðingur av flatbønunum eru flýggjaðar dønum aftur, materia sum var yvirflóð tá ið hon varð kubbað, annars er lítið og einki hent í politiskari framsøkn síðani várið í 98. Tingingar av øllum handaslagi, á embætisstigi og politiskt, men úrslitini síggjast bara við luppið. Og hendir ikki okkurt álvarsligt og meiri ítøkiligt hiðani og frameftir, nú samgongutíðin skjótt er hálvrunnin aftur, so kann samgongan skjótt koma sær í vandasjógv. Tað verður trupult hjá Tjóðveldisflokkinum, Miðflokkinum og radikalara partinum av Fólkaflokkinum at leggja seg á fólksins bismara eftir átta árum, um úrslitini ikki vera trivaligari enn nú. Harvið eigur løgmaður, saman við varaløgmanni, at leggja sambandsvongin í løgmansflokkinum og Kára Post undir eitt ávíst politiskt trýst, soleiðis at í hvussu er setningurin í samgonguskjalinum verður framdur í hesum valskeiðnum.

Inertiið í politiskum skipanum er tiltikið. Einki fyri bræsnar og ótolnar menn og kvinnur. Nógv formalia, nógv tos, hópur av pappíri og smá úrslit. Løgmaður og Anders Fogh høvdu ein fund í vetur, 14. januar, í eini roynd at finna praktiskar mannagongdir fyri at útinna setningin í samtyktini um sjálvstýri Føroya fólks. Hittust aftur á Tvøroyri í summar, hin 26. juni, og samdust um at virka fyri eini yvirtøkulóg, sum skuldi gera tað smidligari, at yvirtaka øll málsøkir frá dønum, uttan tey sum hava við sjálvan suverenitetin, skipanina av føroyska statinum, at gera. Og nú hoyrist, at oddvitarnir í samgonguflokkunum eru farnir at tjakast um hvussu lógin skal skipast og hvussu hennara endaliga skap skal vera. Men teir eru ikki einsamallir, danir sita hinumegin borðið, og fara ivaleyst at royna sum frægast, at halda fast um tikin og rænd rættindi.

Hesir kallar eiga at hava tunguna miðskeiðis í munninum. Danir hava ongar ætlanir um at sleppa nøkrum. Teir eru dystin lærdir í stjórnarkynstri, tí má ansast væl eftir, at hendan lógin in spe, ikki setir frumrætt føroyinga í vanda. Tjóðveldis- & Fólkaflokkurin hava ongantíð góðtikið Heimastýrislógina formelt. Tíanbetur. Hinvegin hava báðir valt at liva og virka undir henni. Ein sannroynd sum ikki slepst undan, heldur ikki í tíðarhvarvinum síðani 98. Tí eigur yvirtøkulógin einki annað status at hava, samstundis sum hon bara refererar til sjálva heimastýrislógina, enn tað at gera mannagongdirnar í yvirtøkumálum lættari og greiðari fram til skarpskerðingina í 2012 tá ið politiski skilnaðurin millum Føroyar og Danmark skal vera endaligur veruleiki.

Samgongan eigur at konsultera dyggastu fólkarættar-ekspertisu í heiminum fyri at tryggja sær at ongar bindingar eru í endaligu lógini, sum kompromittera frumrættin og sum annars á einhvønn hátt kunna geva dønum óneyðug vápn uppí hendurnar, sum kunna brúkast ímóti okkum og komandi ættarliðum. Her liggur ein ósvitalig og tung ábyrgd á herðum Høgna, Anfinns, Kára og Jenisar.

Sjálvt um lógin er eitt praktiskt jarnbrot ávegis móti republikkini, so er tað trupult at skilja, hví so nógv hóvasták verður gjørt burturúr henni. Nógvur roykur og eingin grind. Mál røkkast ikki av sær sjálvum, og als einki spyrst burturúr eini rammulóg einsamallari. Politiskt knúgvafeitt, treiskni, hugur, sál og óvikandi sannføring skal til, um nøkur mál skula røkkast yvirhøvur.

Meira ferð má og skal nú setast á samgongumotorin. Yvirtøkusetningurin fyri hetta valskeiðið er greiður: Familjurættarmál, havumhvørvi, kortlegging, upphavsrættur, vinnulóggáva, tilbúgving, veðurtænasta, vitaverk, uppmerking, fjølmiðlaábyrgdarlóg, arbeiðs- & uppihaldsloyvi, tinglýsingin, fólkakirkjan, flogvøllurin, loftferðslu myndugleikin, løgreglan og rættarskipanin.

Nú fræ ttist frá bonaðu gólvunum, at íhaldnir samgongumenn ikki hætta sær undir at skipa hesi viðurskifti undir føroyskum ræði. Orsøkin skal vera ein versnandi búskaparstøða. Hann náði okkum. Soleiðis hugsar einki annað fólk í heimi. Tað kann ikki verða rætt, at tilvildarligir prísir á exportmarknaðum okkara skula avgera hvussu tað skal fløða ella fjara viðvíkjandi politiska valdi føroyinga. Skal hýsumarknaðurin í Bretlandi, upsaditto í Týsklandi, toskaditto í Spaniu og rækjuditto í Japan avgera politisku lagnuna hjá hesum samfelagnum, so mega vit bara staðfesta, at tað var ein vanlagna, at suvereniteturin og búskapargongdin so treytaleyst vórðu tengd saman. Politiska pseudospælið í danska aliringinum kann halda fram. Og hevur politiska spektrið ikki hægri tjóðskaparlig mál, enn at toskurin á landgrunninum skal avgera stjórnarskipanarligu lagnu føroya fólks, so hevur fólkið, ið hevur valt hesar menninar ikki betri uppiborið enn svartasta samband. Politiskt vald er nakað eitt hjáland tekur sær og heldur fast um, kosta hvat tað kosta vil. Alt annað má laga seg hareftir. Frumrætturin til landið og tjóðina er einasti rættur, ið vit eiga at ganga undir. Er yvirtøkulógin ein smiðlig sniðgøta haðar ávegis, so verður tikið undir við henni. Gloymið bara ikki, at ávísir leikir ikki kunna endurtakast, og heldur ikki rættast fyri møgulig mistøk. Føroyskir sjálvstýrismenn eru farnir at ótolnast. Hvøll ljóð úr firruni hoyrast nú frá føroyskum kongum, ið aftur eru farnir at bretta sær á.

# Menningarhjálp

**Ása Justinussen**

Nú tá orðaskiftið aftur hevur tikið seg upp um, hvørt tað almenna Føroyar letur ov lítið í menningarhjálp, havi eg eitt hugskot.

Landsstýrið skal skriva niður til donsku stjórnina og biðja hana senda t.d. 10 mió.kr. beinleiðis til menningarhjálp av onkrum slag og taka peningin burturav blokkstuðulinum. So hava vit latið pening til menningarhjálp, og avsendarin er tann rætti, nevniliga danska fólkið.

Eg haldi tað vera ótrúliga dupultmoralskt av okkum at "reypa" av at vit lata menningarhjálp, tá ið tað eru donsku arbeiðskonurnar og arbeiðsmenninir sum hava sent peningin til okkara, tí at »vit ikki kunnu klára okkum uttan«.

Tað hevur ongantíð verið hildið at vera nakað serligt at geva gávur víðari.